LØGTINGIÐ

*Jógvan Amonsson*
*Gunn Ellefsen*
*Maria á Dul*

Løgtingsformaðurin

**j. nr.**
(at tilskila í svari)

**Endurskoðan av løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna**
Løgtingsformaðurin setir eina nevnd við trimum fólkum at geva formansskapinum eina eftirmeting og møguligt tilmæli um broytingar í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna. Ein av limunum skal vera løgfrøðingur, ein skal vera kønur í lønarmálum og ein skal vera roknskaparkønur. Løgtingið ber kostnaðin av arbeiðinum hjá nevndini. Nevndin skal lata formansskapinum tilmælið 1. mars 2018. Løgtingsformaðurin hevur tikið avgerð um at heita á tykkum trý um at manna hendan arbeiðsbólk.

**Arbeiðssetningur:**
Endamálið við arbeiðinum er at tryggja formansskapinum eitt dygt og væl grundað tilmæli um samsýningar og eftirløn løgtingsmanna, og skal nevndin taka atlit til:

- lønarlagið í landinum yvirhøvur
- ta tign og ábyrgd, sum liggur í tingsessinum
- hvussu tingmenn í grannalondum okkara verða løntir og
- onnur viðkomandi viðurskifti.

Tað er ein avbjóðing í verandi skipan, at munandi broytingar eru gjørdar í landsstýrismanna-lønum og -eftirlønum, uttan at nakað er gjørt við løgtingsmannalønirnar. Í løtuni er talan um tvær sera ymiskar skipanir, serliga tá um eftirløn ræður. Tað er ein sannroynd, at fólk javnan flyta seg úr Løgtinginum í landsstýrið og øvugt.

Á Løgtingi, 14. november 2017

Páll á Reynatúgvu
løgtingsformaður

LOGTING.FO

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901